# Golf Variant við TSI-motori

**Triðja generatión av VW Golf Variant (stationcar) fær heimspremieru á altjóða bilaframsýningini í Genéve, sum er í hesum døgum. Bensinmotorurin við 140 hk er tann fyrsti og einasti av sínum slagi í heiminum við TSI motortøkni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

VW Golf Variant, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1993, kemur nú í triðju generatión við heilt nýggjum stíli – serliga aftan.

Bilurin er sera rúmligur við viðførisrúmi upp á 690 litrar, og við baksetrunum niðri verður vørurúmið heilar 1550 litrar.

Nýggi Golf Variant fæst við tveimum benzin- og tveimum dieselmotorum. Benzinmotorarnir eru upp á ávikavist 102 og 140 hk. Hesin við 140 hk er tann fyrsti av sínum slagi í heiminum við TSI-motortøkni, t.v.s. við bæði kompressara og turbo "Twincharger", ið sameinir góða kraft við góða økonomi og sera lágt $CO_2$-útlát.

Dieselmotorarnir eru upp á ávikavist 105 og 140 hk, sum báðir eru orkusparandi og umhvørvisvinarligir.

Eftir ætlan kemur nýggi Golf Variant á marknaðin í august 2007.



*Nýggjur Golf Variant kemur eftir ætlan á marknaðin í august 2007*



*Heilt nýggjur stílur hjá VW - smart design. Minnir ikki serliga nógv um ein Golf*

# Subaru við heimsins fyrsta boxerdiesel

**Subaru eru á veg á marknaðin við heimsins fyrsta boxer-dieselmotori, sum larmar sera lítið og er uttan ristingar. Fyrsti bilur við hesum motorinum verður Subaru Legacy Outback**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Subaru, sum einans gera bilar við boxermotori, eru nú til reiðar við heimsins fyrsta boxer-dieselmotori, sum verður sýndur fram á altjóða bilaframsýningini í Genéve í hesum døgum.

Subaru er eisini einasta bilmerki í heiminum, ið framleiðis persónbilar, sum allir verða drivnir av øllum fýra hjólunum. Japanska Subaru-verksmiðjan vilja vera við, at nýggi boxer-dieselmotorurin larmar sera lítið og er uttan tær ristingar, sum vanliga merkjast í boxer-bensinmotorunum.

Enn er ikki upplýst hvussu stórur motorurin er, men talan er um ein commonrail dieselmotor við og beinleiðis innspræning. Fyrsti bilur við hesum motorinum verður Subaru Legacy Outback.



*Subaru Legacy Outback verður fyrsti bilur við heimsins fyrsta boxer-dieselmotori*


